# Fekk ikki tingsess í føðingardagsgávu

**Annlis Bjarkhamar fekk ikki akkurát tað føðingardagsgávuna, hon stílaði eftir, men tað ger minni, heldur hon**

LØGTINGSVALIÐ 2004

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Annlis Bjarkhamar sigur, at sambandsflokkurin hjálpti tjóðveldisflokkinum til at vinna løgtingsvalið týsdagin*

Annlis Bjarkhamar í Vági er nøgd í dag.

Hon er nøgd, hóast hon ikki akkurát fekk ta føðingardagsgávuna, hon hevði stílað eftir, nú hon týsdagin 20. januar, fylti runt.

Hendan dagin fylti hon 30 ár. Samstundis stillaði hon upp til løgtingsvalið fyri tjóðveldisflokkin í Suðuroy.

Hetta er fyrstu ferð, at hon stillar upp og tað fekk hon 145 atkvøður burturúr. Tað rakk verri enn so til ein tingsess, eftirsum Hergeir Nielsen varð afturvaldur við 217 atkvøðum.

Men tað leggur Annlis minni í sigur hon.

– Tað veldst alt um, antin eg skal hugsa um meg sjálva, ella um eg skal hugsa um heildina. Og skal eg velja ímillum mínar egnu atkvøður, ella tað, at tjóðveldisflokkurin fekk eitt so mikið gott val, at stríðið fyri føroyskum sjálvstýri kann halda fram, er ongin ivi um, hvat eg velji.

– Tað, sum hevði størstan týdning er, at tjóðveldisflokkurin hevði eitt gott val.

Sostatt er hon avbera nøgd við valið, tí úrslitið gjørdust, at tjóðveldisflokkurin gjørdust størsti flokkur í tingmannatali.

Hon er er eisini vælnøgd við at fáa 145 atkvøður.

– Tað er natúrligt at okkara umboð á løgtingi stendur sterkastur í myndini, ikki minst nú tað er komið so nógv á skaftið fyri Suðuroynna, sum ongantíð fyrr í søguni.

– Men mínar atkvøður hava so verið eitt íkast og hava gjørt sítt til at tryggja mannin í Suðuroynni, so tað eri eg væl nøgd við.

### Sambandið hjálpti tjóðveldinum

Tað sá annars onki serligt út hjá tjóðveldisflokkinum fyrst í januar mánaða, tá ið tann fyrsta veljarakanningin varð almannakunngjørd, tí eftir henni fór tjóðveldisflokkurin at gerast tann stóri taparin og sambandið tann stóri vinnarin.

Tí vóru allar orsøkir hjá Annlis at stúra fyri gongdini.

– Men so hvørt sum valstríðið leið, tess meiri sannførd gjørdist eg um, at veljarakanningin fór ikki at halda.

– Ikki minst hava vit havt ein sera sannførandi formann í Høgna Hoydal, sum hevur dugað avbera væl at ført okkara boðskap fram. Men eisini nógv onnur hava ført boðskapin greidliga fram fyri fólki.

Hon heldur eisini, at hetta valstríðið prógvar, at tað ber ikki til at keypa seg til ein valsigur.

– Vit eru tann flokkurin av teimum stóru, sum hevur brúkt nógv minst av pengum upp á valstríðið. Hetta vísir, at tað er boðskapurin, sum telur.

Annars heldur Annlis Bjarkhamar eisini, at sambandsflokkurin hevur hjálpt tjóðveldisflokkinum væl í hesum valstríðnum.

– Sambandsflokkurin førdi i veruleikanum eitt ógvuliga gott valstríð fyri okkum. Tá ið teir komu við sínum boðskapi um »farvæl fullveldið«, fingu teir fólk at steðga á og at hugsa, tí hetta var at ganga innastu kenslunum hjá fólki ov nær. At siga »farvæl fullveldið« er tað sama sum at siga »farvæl, hin føroyska tjóðin«. Ein slíkur boðskapur býður fólki ímóti og tað hevur havt akkurát øvugta ávirkan av tí, sum sambandsflokkurin ætlaði.

– Føroyingar eru ósamdir um, hvussu skjót sjálvstýristilgongdin skal vera, men tað, sum sambandið bað føroyingar gera, var at bakka eftir hæli og tað vilja føroyingar sjálvsagt ikki.

Annars hevur Annlis ikki heilt mist hugin til politikk, hóast hon ikki varð vald.

Tí viðgongur hon eisini, kemur tjóðveldisflokkurin í samgongu og bjóðar henni ein landsstýrissess, hevði hon sanniliga umhugsa tað. Tað, sum hon vónar, er at tjóðveldisflokkurin og javnaðarflokkurin koma í eina samgongu við onkrum øðrum.

– Tað hevði verið tað besta fyri okkara sosial- og vinnupolitikk og eg ivist ikki í, at teir báðir flokkarnir eisini kunnu koma rættiliga langt á ríkisrættarliga økinum, men har mugu so báðir flokkar geva seg eitt sindur, sigur Annlis Bjarkhamar.

# Fingu lønina fyri eitt søguligt valskeið

**Hetta hevur verið eitt søguligt valskeið fyri Suðuroynna og tað hevur veljarin svarað til, sigur Hergeir Nielsen, afturvaldur løgtingsmaður**

LØGTINGSVALIÐ 2004

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*– Ongantíð áður er so nógv hent í Suðuroy sum í farna valskeiði og tað hevur givið úrslit, heldur Hergeir Nielsen, sum varð afturvaldur á ting*

– Hetta gekk sum tað skuldi.

Hergeir Nilsen, afurvaldur tingmaður fyri tjóðveldisflokkin í Suðuroy er rættiliga vælnøgdur við úrslitið av løgtingsvalinum, sigur hann í eini stuttari viðmerking.

Men hann hevði eisini væntað eitt gott úrslit, hóast tann fyrsta veljarakanningin sá ikki nakað serligt út.

– Tað var rættiliga skjótt at eg kom eftir, at veljarakanningin fór ikki at halda, tí tað kundi aldrin passa, at tjóðveldisflokkurin skuldi vera fyri so stórari afturgongd, sum hon vísti.

Men hann var kortini sannførdur um, at tjóðveldisflokkurin stóð til eina afturgongd, ikki minst nú eisini fólkaflokkurin var farin at tevja tingsess í Suðuroy og gjørdi rættiliga vart við seg. So hann visti eisini, at tað skuldi stríðast fyri at varðveita sessin.

Kortini hevði hann góðar vónir, tí hetta hevur verið eitt søguligt valskeið fyri Suðuroynna, tí tað er ongantíð so nógv hent í oynni í einum valskeiði, sum hesuferð, og tað hevur sjálvsagt ávirkað úrslitið av valinum.

Hann sigur, at tá ið nýggi Smyril er komin, eru møguleikarnir eisini at reka vinnu í Suðuroynni líka góðir sum aðrastaðni í Føroyum og hann ivast heldur ikki í, at vinnan fer at fóta sær aftur.

– Uppgávan hjá politikarum verður at tryggja, at umstøðurnar hjá vinnuni í einum parti av landinum ikki verða verri enn í einum øðrum parti av landinum. Sostatt skulu virki í útjaðaranum ikki vera verri fyri enn virki í miðstaðarøkinum. Og er flutningskostnaðurin ein trupulleiki, verður neyðugt at fáa tað í rættlag, sigur Hergeir Nielsen.

Annars ásannar hann at undanfarna samgonga kom styrkt burturúr valinum.

– Vit høvdu 17 tinglimir í samgonguni, men eftir valið hava teir fýra flokkarnir, sum myndaðu samgonguna, 18 tinglimir.

Men fyri tað sigur hann ikki, at hendan samgongan skal endurskipast.

Hann heldur, at tað eru nógvir møguleikar fyri eini nýggjari samgongu og hann vil ikki nevna nakran ávísan.



# Norröna siglingarklár

**Arbeiðið upp á at gera Norrönu siglingarklára aftur hevur gingið væl. Og hevur Tórshavnar Skipasmiðja boðað frá, at alt verður liðugt frá teirra síðu fríggjamorgunin klokkan 8**

NORRØNA

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Vit eru júst nú við at fáa tað seinasta frá hondini, sigur Thormund Johannesen, ið hevur ábyrgd av nýbygningum og størri projektum á Skipasmiðjuni. Thormund væntar, at arbeiðið verður liðugt mitt á nátt, og tí kann Skipasmiðjan lova, at Norröna verður klár frá teirra síðu fríggjamorgunin klokkan 8.

Skipasmiðjan hevur fyribils umvælt skaðarnar, sum Norröna fekk, tá hon bar við land á Viðarnesi og molan í Havn fyri góðari viku síðani.

Teir hava skorið úr, har sum hol kom á inn til maskinrúmið og sett nýtt í. Eisini eru nakrar styrkingar gjørdar undir vatnganginum.

Arbeiðið uppá Norrönu byrjaði fyri eini viku síðani, tá ein fyribilstetting var gjørd, so skipið kundu hálast. Hetta var um middagsleitið seinasta fríggjadag. Og so var farið í gongd við tað arbeiðið, sum nú er liðugt.

So fríggjamorgunin er Norröna sum sagt siglingarklár, so hon kann fara um Atlantshavið til ta skipasmiðjuna, sum fær uppgávuna at umvæla hana.


*Dúgliga hevur verið sveisað og tett hesa farnu vikuna fyri at fáa Norrönu siglingarklára aftur, so at hon kann fara um Atlantshavið á útlendska skipasmiðju*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Óvanliga nógv óhapp gera um seg í ferðsluni

**Sambært løgregluna í Eysturoy hevur talið á óhappum sum raka bilferðsluna verið óvanliga høgt ta seinastu tíðina**

BILFERÐSLA

*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*


*Upprudding aftan á frontalan samanstoyt við norðaru innkoyring til Norðragøtu.*

*Mynd: Maria Olsen*

Dalurin í Norðragøtu, kendur sum ein trafikal pulsæðr ið sambindur Klaksvík, Fuglafjørð og Leirvík við tað sokallaða meginøkið. Seinnapartin mikudagin 21. januar er ferðslan lívlig sum vanligt. Ein bilur kemur koyrandi niðan fram við Shell støðini fyri síðani at taka síðuvegin høgru móti Leirvíkstunlinum; av onkrari orsøk broytir bilførarin knappliga hugsan og vendir inn aftur á høvuðsvegin, men tann sum koyrir í hølunum á honum fær ikki stundir at lesa teir skjótu tankarnar og… BAING BOUM. Vit hava eitt ferðsluóhapp.

Schandorff Vang, ein av politistunum í Eysturoy, er skjótur á staðið. Tíbetur eingin fólkaskaði hesuferð, hóast bilarnir fingu skaða. Alt verður noterað sambært teimum vanligu mannagongdunum tá ið óhapp henda, impliceraðir partar verða hoyrdir og fáa boð um hvat og hvussu.

So aftan á umleið ein tíma er Schandorff Vang klárur við fyrsta partin av sínum arbeiði í sambandi við hetta óhapp. Hann setir seg í bilin fyri at koyra út móti sínum arbeiðsplássi á Politistøðini í Runavík; men ikki er hann meira enn komin um svingið til Gøtugjáar, nú ljóðar alarmurin aftur í biltelefonini.

Hesuferð kann tað vera meira álvarsamt og Schandorff Vang vendir straks bilinum fyri at koyra aftur til umleið sama stað har hann júst hevði verið. Tað vísir seg at nakrar metrar burtur frá tí fyrra óhappinum, við ta norðaru innkoyringina til Norðragøtu, er ein ógvusligur samanstoytur farin fram. Ein bilur hevur rent frontalt saman við ein annan og ein triði er raktur eisini.

– Hetta var ikki gott, viðmerkti politisturin nakað seinni tá vit tosaðu við hann.

– Tann eini bilførarin var skorin í andlitið oman fyri tynningin og mátti flytast á sjúkrahús; vónandi fekk hann ikki álvarsligt mein…

### Blendandi sirm?

Tað sum hendi var sambært løgregluna fylgjandi: Tríggir bilar standa stillir við vegjaðaran beint við ta norðaru innkoyringina til Norðragøtu; ein bilur kemur koyrandi av Kambsdali um eiðið og oman gjøgnum dalin, helst við høgari ferð.

Antin leggur bilførarin ikki merki til at teir tríggir bilarnir standa stillir og kunnu tí heldur ikki geva nakrar stórvegis indikatiónir um hvat sum hendir rundan um teir, ella so hevur hann so nógva ferð at hann ikki kann steðga á og vera á varðhaldi tá hann yvirhálar. Hann sær ikki mótferðsluna og í tí løtu hann yvirhálar kemur ein annar bilur koyrandi við mótsettari kós niðan móti dalinum og teir bresta saman frontalt. Stoyturin er harður og tekur eisini við ein av teimum trimum bilunum ið stóðu stillir. Teir báðir bilarnir ið renna saman frontalt fara illa av og bilførarin í tí bilinum sum koyrdi oman úr dalinum fær so mikið av snuddum at hann má á sjúkrahús.

Dagin fyri hesi óhappini hendi eisini eitt við Streymin og fyri fáum døgum síðani eitt annað á Strondum. Síðst nevnda involveraði at tveir bilar møttust beint við ein triðja sum stóð stillur við vegjaðaran. Av onkrari orsøk gekk tað galið við orienteringini og bilarnir stoyttu saman.

– Óhappini í ferðsluni hava verið óvanliga nógv her teir seinastu tíggju-tólv dagarnar, helt Schandorff Vang fyri.

– Vit hava enn ikki kunnað staðfest orsøkina til at so nógv fleiri óhapp hava hent hetta tíðarskeiðið samanborið við mótsvarandi tíðarskeið í fjør; vónandi eru vit ikki á veg aftur móti teimum tíðunum tá ið óhappini vóru fleiri… Onkur hevur so illgruna um hetta sirmið vit hava havt so nógv av, tá tað fer fram saman við ljósi frá mótferðslu, at tað gevur eitt ógvuliga vánaligt sýni hjá bilførarum.

– Eg vil tí minna øll á at tað er altíð tryggast og best at halda seg so væl til ferðslureglurnar sum yvirhøvur gjørligt og vísa størsta varsemi, serliga tá sýnið er so undarligt sum tað eftir øllum at døma er fyri tíðina.